ella góðtiknar, kann alt gera tað sama. Hevur tú ikki virðing fyri og álit á teimum fólkunum, tú ert saman við, ja so vera ongar ósemjur loystar. Endamálið hjá Finni er ikki at loysa ósemjurnar, men at gera tær størri, tað sást enn einaferð á eykaflokstinginum, og tí vera tær ikki viðgjørdar, har tær eiga at verða viðgjørdar. Tí rumblar Finnur í bløðunum. Tað, sum Finnur vil, er, at eg og øll onnur í flokkinum skulu makka rætt, tí annars fer hann í bløðini. Finnur er kritikkarin, sigur hann. Sum flest øllum kunnugt eru tvey sløg av kritikkarum. Tann eini finst at til tess at byggja upp. Hin finst at til tess at bróta niður. Ilt eyga kann einki gott sjá. Finnur er kritikkarin, sum brýtur niður. Nei Finnur, ert tú ónøgdur við formannin, so hevur flokkurin lið, har hetta kann viðgerast og avgerast. Tú kundi t.d. sjálvur stillað upp til formann og harvið roynt undirtøkuna.

Eg segði eisini á flokstinginum, at har sum Finnur er, er klandur og stríð. Finnur góðtekur heilt einfalt ikki skipaði viðurskifti. Finnur hevði verið og verður í andsøgn móti einum og hvørjum formanni líkamikið, hvør formaðurin er. Um flokkurin hevði skift formann, so gingu bara 4-6 mánaðir, so hevði Finnur verið í andsøgn við ein nýggjan formannn. Tá ið eg sigi hetta, so er tað sjálvsagt av teimum royndum eg havi havt í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag. Hvørjaferð val hevur verið, og har Finnur hevur verið partur av, hava trupulleikar verið. Serliga hevur stríðsmál tikið seg upp, tá ið avgerð skuldu takast, um nær og hvar tey ymsu valevnini skulu røða á veljarafundum, og hvørji valevni skuldu framat í fjølmiðlunum. Finnur hevur vanliga ikki verið nøgdur við tað, sum honum hevur verið tillutað og hevur insuerað, at nevndin í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag hevur tikið onnur fram um hann. Ja, hann hevur verið so illur, at hann meira enn ta einu ferðina reisti seg upp frá borðinum, er farin út og hevur ripað hurðina aftur, so alt mundi gingið í grund. So kann ein og hvør hugsar sær, hvussu stemningurin hevur verið, tá ið Finnur einaferð kom aftur. Hvørt orð skuldi vigast. Finnur var ikki uppstillaður til býráðsvalið í heyst og tað merktist. Valevnini stríddust so manniliga við hvørjum øðrum og fyri hvørjum øðrum. Ongar illgitingar, hurðaklams, róp og skrálan. Ikki var neyðugt at viga hvørt orðið. Ein uggi og fløvi í øllum klandrinum, sum annars var aðrastaðni í flokkinum.

Í viðmerkinginum kemur Finnur inn á mítt arbeiðið. Eg kann siga Finni, at eg ikki las jólaevangeliið fríggjadagin. Tað gjørdu børnini. Men eg kann fortelja føroya fólki, at Finnur Helmsdal eisini í sínum ungum døgum royndi seg sum lærari. 25 ár seinni á samkomu kom prát næminganna inn á henda mannin. Eg skal tó ikki endurgeva, hvat sagt var. Men Finnur er lítið broyttur.

Eitt annað ódámligt við Finni er, at hann látursgerð og niðurgerð kvinnurnar í flokkinum. Hann skrivar t.d. kelidukkurnar hjá Høgna og hevur sagt m.a. »hava kvinnurnar í Tjóðveldisflokkinum ikki nóg nógv at siga«. Skilt á tann hátt, at hava tær ikki alt ov nógv vald í flokkinum. Her eri eg eisini fulkomiliga ósamdur við Finn Helmsdal. Mín sannføring er, at vit koma ongan veg á fullveldisleið, um vit ikki fáa kvinnurnar við. Meira kundi verið skrivað um hetta. Men lat tað fara á hesum sinni.

Samanumtikið kann vera sagt, at fáur um nakar hevur fingið so nógv fyri so lítið burturúr einum politiskum flokki sum Finnur Helmsdal. Bert við at seta eina andlitsmynd uppá nakrar streyrar og skriva sosialiprofilurin undir, var nóg mikið til, at hann við lutakasti kom á ting. Ikki tí at hann fekk tær nógvu atkvøðurnar, men tí onnur í flokkinum fingu nógvar atkvøður.

Ítróttarskrivarin í Sosialinum segði tað so væl herfyri. Finnur Helmsdal fer eftir manninum heldur enn eftir bóltinum. So satt so satt.



*Lítla fitta Eydna Cæcilia fekk sítt lívs upplivilsi í Hoyvík leygardagin. Her saman við abbanum Jóannesi Dalsgaard*

*Mynd Jan Müller*

# Jólahugni heima á Garði í Hoyvík

Leygardagin og sunnudagin leitaðu hundraðtals børn og vaksin sær niðan í Hoyvík at síggja sera forvitnisliga garðin, kava- og jólaklæddur. Hetta er útisavnið hjá Fornminnissavninum. Inni í roykstovuni í Hoyvíksgarði var kynt við torvi í komfýrinum, bakaður var onkur forkunnugur jólabakstur, borðreitt var við siðbundnum føroyskum mati, og blíðar konur stákaðust innandura. Høvi var hjá fólki at vitja eina farna tíð og síggja, hvussu føroyingar hava búleikast fyrr. Hetta var eitt av teimum stóru jólaupplivilsunum fyri mong, sum heldur valdu friðsæluna í Hoyvík enn strongdina í miðbýnum. Ein kærkomin løta.



*Kynt varð við torvi í komfýrinum*

*Mynd Jens K Vang*



*Henda fitta gentan setti eisini sín dám á jólahugnan*

*Mynd Jan Müller*